Olivur og Hanni í Listaskálanum

Olivur við Neyst er annar av listamonnunum, sum sýnir fram í Listaskálanum frá í dag av. Hanni Bjartalíð er hin, og tað eru myndir hjá honum, sum hanga í bakgrundini

Mynd: Jens K. Vang

Í dag klokkan 16 lata Olivur við Neyst og Hanni Bjartalíð upp framsýning í Listaskálanum

FRAMSÝNING

Solby A. Eliasen

Hanni Bjartalíð og Olivur við Neyst mugu sigast at vera tveir sera virknir og áhugaverdir listamenn. Á framsýningini leygardagin sýna báðir fram ymsar teknikkir, tað eru vatnlitir, oljumáling og prent, men tað áhugaverda er, at teir gera tað upp á hvør sín hátt.

Báðir stava teir úr Klakskvík, men teir umboða hvør sítt ættarlið og hvør sítt myndamál.

Verðin hjá Hanna Bjartalíð, sum er fødduur í 1968, er fjølbroytt, men byggir aloftast á eitt slag av frásøgukendum upplivingum, sum kunnu vera droymandi og ævintýrakend, men eisini full av speisemi. Hann sigur frá við einum modernistiskum og ekspressivum myndamáli.

Hinvegin er Olivur við Neyst, føddur í 1953, óivað meira klassiskur modernistur, tí hann leggur dent á litir, rørslu og bygging, tó so at motivini, so sum landslag, fuglar, fólk og skip, ongantíð fána burtur.

Í tíðindaskrivi sigur Listasavn Føroya, at tað gleðir tey, at tað eydnast at skipa fyri hesi framsýning, har tvey so ymisk listafólk fáa høvi at rúmast undir sama taki.

Listaframsýningin verður opin til 21. apríl.

Tvær ferðir Jógvan Asbjørn Skaale

Jógvan Asbjørn Skaale er virkin listamálari og hetta vikuskiftið letur hann ikki minni enn tvær framsýningar upp, ein er í Fuglafirði og ein er á Tvøroyri

Hetta vikuskiftið letur Jógvan Asbjørn Skaale tvær framsýningar upp í hvør sínum enda í landinum

LISTAFRAMSÝNING

Áki Bertholdsen

Tað er ikki ofta, at listamálarar hava tvær framsýningar ísenn.

Men tað hevur Jógvan Asbjørn Skaale, listamálari tær næstu vikurnar.

Báðar listaframsýningar lata upp hetta vikuskiftið, men tær eru í hvør sínum enda í landinum.

Onnur framsýningin er í Ribarhúsi í Fuglafirði og hon lat upp klokkan 15 í gjár og er opin til 23 apríl. Hetta er ein framsýning um kvinnurnar hjá Jógvan Asbjørn Skaale og málningarnir eru 23 í tali.

Framsýningin er opin mánadag til fríggjadag frá klokkan 15 – 17.30 og leygardag frá klokkan 11 – 13.

Hon framsýningin er í listaskálanum Oynni á Tvøroyri. Hendan framsýningin letur upp sunnudagin klokkan 15.

Á framsýningini eru nógvir málningar og hendan framsýningin er eisini opin í tvær ella tríggjar vikur.

Oyggin er opin hvønn dag frá klokkan 15 til 20, men mánadag er stongt.

Í Oynni er eisini ein lítil kaffistova, so ímeðan ein er á framsýning, ber til at hugna sær við einum kaffimunni, einum glasi av víni ella eini øl og einum løttum bita ella kaku afturvið.

Fiskivinnunæmingar søkja innivist

Leiðslan á Fiskivinnuskúlanum i Vestmanna hevur sent vestmenningum bræv, har sagt verður fra, hvussu kalt tað er, tá ongastaðni slepst undir tak

BÚSTAÐARTRUPULLEIKAR

Edvard Joensen

Vestmanna: Fiskivinnuskúlin hevur sent vestmenningum bræv við áheitan um at hýsa næmingum skúlans eftir summarfrítíðina. Vestmenningar eru positivir.

– Vit frysta úti, sigur Fiskivinnuskúlin í skrivinum til vestmenningar, har heitt verður á fólk um at seta kamar, íbúð ella hús til taks til fiskivinnunæmingarnar, sum koma langvegis frá í skúla.

Sagt verður, at fleiri av teimum næmingum, sum longu eru á skúlanum, verða húsvillir eftir summarfrítíðina. Og teir, sum koma nýggir, hava heldur ikki betri í væntu. Tað kann so í ringasta føri gera, at onkur má gevast, og onnur ongantíð byrja, tí eingin bústaðarmøguleikar eru. Og tað er spell, halda tey á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

Og so kemur skúlin við einum hjartasuffi, sum líkasum mest líkist einum paradoksi.

– Vit tora ikki at hugsa um, hvussu støðan verður í 2005, tá ein nýggjur skúli vónandi stendur liðugur, sum er ætlaður til 100 næmingar, men kanska fara kommunan ella onnur í holt við eina varandi loysn til ta tíð, stendur millum annað í skrivinum, sum Fiskivinnuskúlin sendi vestmenningum herfyri.

Eyðun Leo, sum er umsitingar- og praktikkleiðari á Fiskivinnuskúlanum, sigur, at tey hava fingið eitt sindur av afturmeldingum, men at tað saktans kundi verið fleiri.

– Og einki gjørdi heldur, um tær vóru heilt ítøkiligar, sigur Eyðun Leo, sum visir á, at fólk vísa góðan vilja, men í fleiri førum geva tey ikki nakra heilt bindandi tilsøgn kortini.

Hann væntar tó, at hendan áheitanin fer at hjálpa, hóast hon kanska ikki beinaveg hevur loyst tann trupulleika, sum heilt givið verður eftir summarfrítíðina.

– Soleiðis er tað á hvørjum ári, sigur hann, men vit plaga at fáa herbergað teimum flestu kortini.

Men í ár verður so tann trupuleiki, at fimm av næmingunum, sum hava gingið á Fiskivinnuskúlanum og búð í einum húsum hjá kommununi, verða húsvillir eftir summarfrítíðina. Tá skulu húsini nevniliga brúkast til barnaansing, og so ber ikki til at búgva í teimum meira, vísir hann á.

Hjá teimum, sum búgva, har landfast er, ber til at koma og fara, hóast tað viðhvørt kann vera eitt sindur tvørligt. Men hjá øðrum, har sund er ímillum, ber hetta jú ikki so væl til, og tí er alneyðugt, at fólk fáa nakað at búgva í, um hugsast skal um at ganga á Fiskivinnuskúlanum, sigur Eyðun Leo.

Og so er her eitt paradoks eisini. Tað eru næmingarnir úr Vágum, sum nú, undirsjóvartunnilin er komin, eru nógv verri fyri enn fyrr, tá siglt varð av Oyrargjógv til Vestmanna og lagt at beint undir skúlanum.

Nú skulu ey við bussi, sum steðgar í Kollfjarðardali. So bíða tey og skifta buss, sum so koyrir tey til Vestmanna. Sama veg verður farið heimaftur. Umframt at tað nú eisini er dýrari hjá teimum at koma til og úr skúla.

Vanliga plagar tað at liggja um eina helvt til tveir triðingar av næmingunum á Fiskivinnuskúlanum, sum vilja hava okkurt at búgva í í Vestmanna, sigur Eyðun Leo.

Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, er stødd uttanlands, og tað eydnaðis ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar, at fáa at vita aðrastaðni frá, um Vestmanna Kommuna hevur í hyggju at gera nakað við hetta málið.

Fiskivinnunæmingar søkja innivist

FØROYAR - TÝSKLAND 11. Juni

BÍLEGGINGARSKJAL TIL ATGONGUMERKIR

Forsølan er frá 7. apríl til 5 mai 2003

Navn	Gata	Bygd/Býur	Barn	Vaksin	Bókur	Rab

Virsarliga skriva (tøkuliga við blokkbókstavum navnini og bústað á teimum, sum tit bileggja fyri.

Undirtakið bileggur harvið ___ stk. vaksin (17 ár og eldri) á kr. 250 og ___ stk. barn (0-16 ár) á kr. 100.
(Ferðatryggjal á kr. 18,- verður lagt á hvørt atgongumerki til í mesta lagi kr. 40,- fyri hvørja bílegging)

Váttanin frá Fótbóltssambandinum saman við gjaldsnótum skal sendast til:

Navn: _____

Bústaður: _____

Telefon: _____

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA (FSF)
Gundadalur • Postrúm 3028 • FO-110 Tórshavn
Telefon: +298 457807 • Telefax: +298 457482
Heimasíða: www.football.fo
Teldupostur: foroya@football.fo
(FSF tilmælir eina sterka tilsvitan bileggingina um leiðir verður nøkt neyðugt)



Í fimsetu verða seidir bílkarmir frá nr. 1 til 13, tað vil sigva eystura langsiða og suðurendin, tó er tað so, at 12-raðar, verlíga eitur í bólki 11, og hava vit eitt ítøkilut yvirlit frá talinum, um at tíla atgongumerkir í nevnda bólki. Tí verður heilt á lívrinar í 12-raðnum, um at upplýsa "12 raðar", í sambandi við bileggingina, ella fyri raðnum á ákygdaru. Á langsíðunni eru 13 rað, A sitteð til M vestast í hvørjum bólki, og hava bólkarnir 1 og 8 25 setur í hvørjum raðnum, meðan bólkarnir 2,3,4,5,6 og 7 hava 20 setur í hvørjum raðnum. Við enden eru 14 rað, í hvørjum bólki A sitteð til N vestast, og hava bólkarnir 10, 11 og 12 25 setur í hvørjum raðnum og bólkarnir 9 og 13 25 setur í hvørjum raðnum, nr. 1 er altid til vinstru eftir ov vellinum. Váttan um tiltalaði atgongumerkir verður send frá FSF í seinasta lagi 10 dagar eftir bílegging, við ósktan um gótskriv og rímsen av peninginum innan 10 dagar, annars verða atgongumerkini seld aftur. Goldnu atgongumerkini verða send ákygdarpersónunum uttanfyri 10 dagar eftir stevnin.